## DAGSINS MEINING

# Vantandi fólkaræði

Í síðstu viku varð endaliga greitt, at Annita á Fríðriksmørk verður nýggjur landsstýrismaður í mentamálum. Afturímóti er ikki greitt, um næsti maður á tjóðveldislistanum í Suðurstrreymoy, Finnur Helmsdal, fer á ting fyri Anitu Fríðrismørk. Vantandi semja um almannapolitikkin og ein innanhýsis tvídráttur er orsøkin til, at Finnur Helmsdal hveppir seg við at fara í tingið.

Tað er ein styrki fyri ein persón, at hann torir at siga frá, at í flokkinum er so álvarslig ósemja um politikkin, og so stórur tvídráttur, at hann tímir ikki á ting, tí á tingi verður hann settur uttan fyri alla ávirkan. Men samstundis vísir henda støðan ein veikleika í Tjóðveldisflokkinum og vantandi fólkaræði í flokkinum.

Harafturat sigur tann íkomna støðan nakað um ta hugsjónarligu broyting, sum er farin fram í Tjóðveldisflokkinum tey seinnu árini. Vit skulu ikki so nógv ár aftur í tíðina, tá tjóðveldiskvinnan Karin Kjølbro var ein av framherjunum á løgtingi, tá tað snúði seg um almannamál og sosialu samvitskuna hjá heimastýrinum. Tað var mangan, at hon rann inn um Javnaðarflokkin í vinstru síðu, ella hevði gott samanspæl við javnaðarpolitikkarar í hesum málum.

Uttan at samanbera Karina og Finn annars, kemst ikki uttan um, at Finnur í sínum politiska arbeiði hevur verið ágrýtin á almannaøkinum. Hann tykist hava ein erliga og brennandi áhuga fyri almannamálum og teimum veiku í samfelagnum. Harafturat hevur hann, eins og Kristian Magnussen, við síni vitan og arbeiði stóran kunnleika til hetta stóra og tórgreiða málsøki, sum ein stórur fongur fyri Løgtingið og nevndararbeiðið. Finnur er bersøgin og ballar ikki sínar meiningar inn. Hetta argar summi, men onnur halda, at tað er gott, at ein "spaki verður kallaður ein spaki".

Tvídrátturin kom rættiliga í ljósmála í vár, tá Finnur boðaði frá, at hann tók ikki undir við uppskotinum at taka av endurgjaldið, pápar fáa fyri barnapening. Málið endaði við persónligum tvídrátti millum Finn Helmsdal og Páll á Reynatúgvu, sum átti uppskotið.

Tað er kanska hetta persónliga stríðið, sum fólk hava feskast í huganum, men málið vísir okkum tann nýggja Tjóðveldisflokkin, sum hevur tveitt ein fittan part av sosiala førninginum fyri borð. Somuleiðis vísir hetta málið og málið um Signar á Brúnni okkum, at fólk av røttum kunnu seta spurnartekin við fólkaræðið í Tjóðveldisflokkinum.

At enda kunnu vit seta spurnartekin við, um ein politikkari, valdur ella varamaður, kann loyva sær ikki at taka við einum tingstarvi, tá tað er ósemja millum persónar ella politiska kós á einum málsøki er orsøkin? Er tað ein háð móti veljarunum?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Rætting til blaðgrein um tunell framvið Leirvíks bygd

**Henrik Old**



Í Sosialinum síðsta leygardag hevur blaðmaðurin Rúnar Reistrup grein um loysnina við tunnilsgerð framvið Leirvíksbygd, sum loysn uppá ferðsluna til og frá Norðoyartunnlinum.

Blaðmaðurin sigur at málið var skunda ígjøgnum løgtingið, eftir uppskotið frá Vinnunevndini, og tí ikki nóg væl umhugsa - serliga tá talan var um møguleikan hjá Leirvíkar bygdaráð at halda fram við útstykking av byggilendi.

Blaðmaðurin sigur at vinnunevndin gitti og gitti skeivt tá hon vísur á at uppskotið opnar fyri at bygdaráðið aftur kann fara í holt við útstykking, eftir at Landsverkfrøðingurin ikki hevur loyvt hesum í langa tíð. Samtíðis vísir blaðmaðurin í endanum av blaðgreinini til viðtalu við borgarstjóran í Leivík, Sjúrður Eliasen, hvar hann vísir á at bygdaráðið saman við Landsverkfrøðinginum hevur funnið øki innanfyri tunnilsringin har pláss er fyri einum 20 sethúsum.

Tað er ikki rætt tá sagt verður at málið er skunda ígjøgnum løgtingi. Vinnunevndin hevði fund við Leirvíkar bygdaráð og eina privata byggifyritøku, sum er serkøn í tunnilsgerð, umframt landstýrismannin Bjarna Djurholm við fulltrúa og sjálvan landsverkfrøðingin.

Á fundinum við Leirvíkar bygdaráð tann 18/3 í ár møtti borgarstjórin og tríggir bygdaráðslimir, hvar hesir m.a. gjørdu vart við trupuleikan ið at teir høvdu fingið forboð frá landsverkfrøðinginum til at útstykkja til byggigrundir.

Men kundi ein linjuføring fyri tunnil fram við leirvíksbygd fastleggjast so slapp bygdaráðið í gongd aftur við útstykking, helst ikki har í bygdaráðið upprunaliga var byrjað, men aðra staðni har ávirkan av tunnilsgerð ikki var til staðar.

Tað er júst tað ið hent er, sum borgarstjórin eisini vísir á.

Tann 20. marts hevði vinnunevndin innkalla eina privata byggifyritøku. Á hesum fundi var umrøtt linjuføring undir Leirvíksfirði, sum ikki skal komast nærri inn uppá her. Harumframt var umrøtt spurningurin um koyringina millum núverandi Leirvíkstunnil og komandi Norðoyatunnil, har henda fyritøka vísti á at fleiri loysnir kundu hugsast, m.a. ístaðin fyri boraðan tunnil so ein betongtunnil, sum møguliga kundi gravast niður, álíknandi báðum endunum í Vágatunnlinum har betongboylar eru nýttir áðrenn komið er í fast fjall at bora.

Tann 27/3 hevði nevndin fund við Bjarna Djurholm og landsverkfrøðingin har júst trupuleikin við at bora undir byggilendi var umrøddir. Har gjørdi vinnunevndin landsstýrismanninum greitt, at neyðugt var skjótast møguligt at finna eina nøkulunda linjuføring, so Leirvíkar bygdaráð slapp aftur í gongd við útstykking til húsabygging.

Eg havi trupult við at skilja at landsverkfrøðingurin (um hann er rætt endurgivin av blaðmanninum) sigur seg ikki rokna við at løgtingsmenn hugsaðu um avleiðingarnar av tunnilsgerð, tá teir nærum einmælt samtyktu at loysa trupulleikan í Leirvík við tunnilsgerð. Harumframt var eisini á hesum fundi tosað um ristingar og møguligar skaðar, ið spreinging kundu gera á hús, um bygt var áðrenn tunnil var gjørdur, og um møguligar skaðar á tunnil um sprongt var í øki beint uppi yvir einum tunnli, um bygt var eftir at tunnil var gjørdur.

Umframt omanfyrinevnda fundarvirksemi við allar teir í hugsast kundu verða við í avgerðini um linjuføring av tunnli framvið leirvíksbygd, hevði vinnunevndin eisini fund við alt Leirvíkar bygdaráð við skrivara, hetta var tann 3/12 í fjør, tá sama mál var til viðgerðar í løgtinginum, har vinnunevndin frá einum sera positivum bygdaráð, fekk at hoyra teirra hugsan um loysn av ferðsluni um Leirvík til Norðoyggjar. Ein loysn sum eisini kundi fingið tungu ferðsluna til brennistøðina út úr bygdini. Tá fekk vinnunevndin eisini handa notat um ferðsluna í samband við Norðoyatunnilin, gjørt av ferðsluplanleggingar felagnum Rambøll-NYVIG í samstarvi við Leirvíkar kommunu. Hesum kundi blaðmaðurin fingið nógv gott burturúr um áhugi var fyri tí.

Havi trupult við at síggja, hvat blaðmaðurin ætlar við blaðgreinini, tá hann samstundis vísir á at borgarstjórin upplýsir fyri blaðnum, at bygdaráðið og landsverkfrøðingurin hava funnið eina loysn at útstykkja eini 20 grundstykkir. Tað var júst tað sum vinnunevndin vísti á í sínum áliti til løgtingi, so trupult er at síggja, hvat vinnunevndin hevur gitt um og serliga gitt skeivt um. Hevði blaðmaðurin spurt seg fyri hjá onkrum í vinnunevndini, so hevði hann helst komi hartil, at ikki var grundarlag fyri nakrari blaðgrein í heilatikið.

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna

Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag

SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Alternativir vinnumøguleikar

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



**21. øldin bjóðar vinnum, stjórnum og samfeløgum til frælsa kapping. Vit eru, um vit vilja tað ella ikki, tvungin at verða við í hesi kapping, um vit vilja skapa stabilan vøkstur og vælferð, eisini í teim tíðum, tá hjallurin á havinum er kargur.**

**Eg kundi nevnt eina rúgvu av ymiskum alternativum vinnumøguleikum, men teir reka bert burt í vindinum, um ikki grundarsteinurin og karmarnir fyri hesum hugskotum eru til staðar. Eg vil tí heldur hugleiða um hvørjar fyritreytir, ella hvat umhvørvið skal verða til staðar, fyri at geva alternativum vinnumøguleikum ella verkætlanum tað lagnu, sum tær av røttum skulu hava, nemliga "Succes".**

Eitt eykenni fyri tær fyritøkur ella tey lond, ið trívast í einum tílíkum umhvørvi, er nýhugsan ella nýskapan.

Nýskapan er meira enn verkætlanir ella uppfinning av nýggjum vørum.

Nýskapan kann eins væl vera tengt at øðrum tilgongdum sum t.d. sambandinum, vit hava við veitarar, distributión, leiðslu og sjálvum konceptinum hjá fyritøkuni.

Tað setir krøv at vera nýskapandi, serliga tí at nýskapanin hevur váða við sær; avkastið fyri framman er óvist, og tíðum ómøguligt at gera upp.

Okkara samfelag tryggjar tann einstaka borgarin so væl frá vøggu til grøv, at tað gerðast alsamt færri og færri sum velja tann ótrygga, men spennandi vegin, at gerast sum amerikanarnir siga "self made man".

Stuðul er ikki bert oyðileggjandi, eftirsum tað eru tvey sløg av stuðli.

Tey sum eg vil kallað "ígongdsetarar" leita ikki við lygt eftir, hvar tey kunnu fáa mest møguligan stuðul. Tey stóla 100 % uppá egnu dygdir og satsa alt uppá at teirra hugskot skal eydnast. Hesi hava ein aðra muru enn tey, sum vit fyrr til tíðir í Føroyum kallaðu " teir sokallaðu vinnulívsmenninir" hvørs størsta hugflog var at mjólka landskassanum.

Rakstrarstuðul er kappingaravlagandi og niðurbrótandi, eingin ivi er um tað.

Tilgongdin hjá einari fyritøku sum satsar uppá nýskapan er ofta long - nógv arbeiði verður gjørt til fánýtis, og nógvir trupulleikar skula loysast, áðrenn nakar vinningur er í eygsjón.

Bygnaðurin í eini innovativari fyritøku má verða fleksibul. Fyritøkan má hava eitt ávíst kunnleikastøði innanhýsis, men samstundis vera opin og fáa atgongd til netverk uttanfyri, soleiðis at fyritøkan ikki avmarkar seg sjálva.

Stagnatión er størsta forðingin fyri nýskapan, tí nýskapan krevur viljan at læra.

Sjálv innovatiónin kann býtast upp í trý stig:

- Uppfinningin, ella tað at fáa eitt hugskot (hugskot, skriva verkætlan) hugskot (búmerki liðugt)
- Menningin, frá hugsan til veruleika (ígongdsetan) at fáa kapacitetin í lagi, Íløgufígging og rakstrarfígging, neyðugar íløgur, samskipan, og nú er klárt at seta í gongd. (fysiskar rammir)
- Handilsskapurin, at fáa hugskotið at geva avkast. (samskifti við umheimin)

Triðja stigið í innovatiónstilgongdini, nevniliga at fáa innovatiónina at geva avkast, fevnir um flutning, sølu, marknaðarføring v.m. Her krevst samskipan.

Hvørt av hesum trimum stigunum í innovatións-tilgongdini setir umhvørvinum heilt ymisk førleikakrøv.

Fyrsta stigið í tilgongdini er at fáa hugskot.

Størsti bágin í **"Føroyum"** er ikki, at fólki trýtur hugskot, men heldur, at umhvørvið ikki eggjar til henda hugburð, tí innovatión krevur vilja til at vága, og at tora, sjálvt hugskotið er neyðugt um ætlanin skal førast út í lívið, men hugskotið er bert ein ógvuliga lítil partur av, um øll verkætlanin gerst veruleiki.

Lat okkum taka nýggju Norrønu sum dømi, ein íløga uppá 700 mill, men vit minnast at fólk og íleggjarir vóru skeptisk, og fleiri hildu og halda tað verða púra ørt við hesum skipi, og tað av góðum grundum. Vit høvdu einki fordømi uppá eitt luksus skip við hesum kostnaði í Føroyum. Grundin til at verkætlanin gjørdist veruleiki var í grundini, at útlendskur kapitalur slóðaði vegin uppá íløguna,

Manglandi umhvørvi skapar ótryggleika og skepsis. Taka vit tildømis Noreg, so hevði ein sovorðin verkætlan sum Norrøna verði í heimligum umhvørvi frá byrjan, tí bankar og íleggjarir fíggja og eiga hópin av luksus ferðamannaskipum frammanundan, ikki tí tey sigla í Noregi, men tí norðmenn hava vitanina og hava skapt sær sjálvum karmarnar til hesi ferðamannaskip.

At nýta orku til at fara víðari í innovatiónstilgongdini, har framtíðar avkastið ikki er eyðsæð, krevur harafturat stórt álit millum alment og privat. Tað álitið er sera ringt at fáa eyga á í hesum tíðum, eisini tí at í okkara samfelag er alment vinnulív tann størsti kappingarneytin hjá tí privata, sum tað er sagt so oftani: Kreppuloysnirnar í kreppután eru vorðnar varðandi loysnir í bestu tíðum, uttan serdømi nakrastaðni í okkara parti av heiminum.

Um evnarík fólk ella ígongdsetarar síggja, at umhvørvið onga veruliga tiltrúgv hevur til teirra hugskot, doyr innovatiónsandin.

Hinvegin skal tað professionella umhvørvið lúka út í hugskotunum og duga so væl at útgreina avgerðirnar, at innovatiónin yvirlivir.

Umframt álit og kunnleika krevur næsta menningarstigið frá hugskoti til veruleika áhaldni og disciplin.

Samstundis kann júst hetta stigið bera í sær hugskotini til nýggjar innovatiónstilgongdir.

Afturmeldingar frá marknaðinum eru góðar keldur til at finna ábøtur og nýggj hugskot — um viljin at læra er til staðar. Lat okkum nú siga at eg fái eitt hugskot, sum er alternativt, og eg búgvi í Norður Skotlandi, hvørjir eru mínir møguleikar sum kappingarneyti hjá einum Føroyingi sum fær sama hugskot.

ES grunnur stuðlar 35 % fyri bygging og maskinir + 5 % lokalan stuðul. Hetta er í landnyrðingspartinum av Skotlandi. Í Inverness økinum kanst tú fáa frá hesum 40 % upp til 70 % frá "Local highland Coun-cil/ parlament". Harumframt er stuðul at hjálpa ella leggja lag á hjá arbeiðsfólki tað fyrsta árið. Um tað eru vinnur, sum ongantíð áður eru royndar, so verður stuðul so at siga altíð veittur. Hetta verður gjørt, fyri at onnur øki ella onnur lond ikki skulu fara avstað við verkætlanini.

Íleggingarstuðul er góður, um hann er tíðaravmarkaður bert til ígongdsetarar, men tá eiga øll innan somu branchu at hava somu treytir.

Øll innovatióntilgongin krevur soleiðis yvirlit, tí avbjóðingin er at byggja brúgv frá hugskoti til marknaðin.

Hugburðurin er at samansjóða áhugamálini hjá kundanum, starvsfólkunum og leiðsluni.

Innovatión ella nýskapan er ikki ein tilstandur, ið ein fyritøka knappiliga kemur í. Innovatiónshugburðurin skal verða innbygdur í allari fyritøkuni — 365 dagar um árið.

Fyri at takað samanum, so eru minimumskrøvini, ið tann politiski myndugleikin skal skapa:

- Politiskur stabilitetur
- Avtaka alla kapping millum alment og privat virksemi
- Fara frá orðinum at verða liberalur til at útinna liberalismuna í verki.
- Geva ígongdsetarum minst somu treytir sum ES gevur sínum ígongdsetarum
- Málbær kriterir fyri verkætlanum (vinar og kenningarpolitikkur skal burtur)

# Tróndur

**7. september 1983 10. februar 2003**



„Sorgin er tann kærleikin, ið vit sita eftir við". Nakað soleiðis segðI prestur í kirkjuni 14. Februar 2003. Tung vóru sporini ein av fyrstu sóldøgunum í ár, tá vit fylgdu tær til tín seinasta hvíldarstað her á fold.

Tungt er at siga her og skriva minningarorð um teg. Tað var ein stórur skelkur fyri okkum øll, tá vit hoyrdu, at tú so brádliga gjørdist álvarsliga sjúkur; men vit hildu sjálvandi, at tú fórt at klára tað – Tróndur klárar jú alt – men vit máttu sanna, at hesaferð gekk ikki, sum vit ynsktu.

*Heldur vil eg missa teg*
*enn ongantíð møtt tær.*
Steinbj. B. Jacobsen

*Hjá mær í mínum hugaheimi livir tú*
*soleingi eg livi ljóslivandi*
Steinbj. B. Jacobsen

Tá vit byrjaðu á Føroya Fólkaháskúla 8. Januar 2001, vóru tað sjálvandi nøkur, ið kendust; men tey flestu høvdu ongantíð sæð hvønn annan áður. Tó, tað vardi ikki leingi, áðrenn tú hevði vunnið hjørtini hjá okkum øllum. Tí var altíð í góðum lag, og var okkurt, ið tær ikki dámdi, so segði tú tað beinanveg, ið staðin fyri at dylja tað.

Tú var kreativur sum nakar. Tú málaði, seymaðI tíni egnu klæði og ikki minst, orðnaði hár. Skjótt gjørdist tú „privatfrisør" hjá okkum á háskúlanum. Vit minnast øll, hvussu stuttligt tað sá út, tá allir dreingirnir ta einu tíðina gingu við onkrum løgnum hárliti.

Tú hevði eisini tann eginleikan at fáa fólk at vera „við uppá tingini". Tú var mittpunktið í næstan øllum, ið vit gjørdu. Hvør minnist ikki kvøldini inni í tínum kamari, har vit prátaðu og høvdu tað stuttligt – ofta langt út á náttina. Og tað var altíð hugnaligt, hóast vit oftast máttu sita kroyst saman í seingjunum, so tað skuldi vera pláss fyri øllum.

Ikki bert í góðum løtum var tú har. Tað bar altíð til at tosa við teg um okkurt, ið ikki gekk sum tað skuldi, ella okkurt, ið nívdi. Tú hevði umsorgan fyri øllum – serliga teimum, ið ikki høvdu tað lætt. Vinarlag hevði nógv at siga fyri teg, og tað sást eisini aftur á tí stóra skaranum, ið fylgdi tær á tíni seinastu ferð.

Hóast títt lív ikki skuldi vera so langt, so setti tú tíni djúpu spor í heimin, og tú hevur merkt okkum øll, ið á ein ella annan hátt komu at kenna teg – orð kunnu ikki lýsa tað virðið, tú hevði fyri okkum og ikki minist tíni nærmastu.

Góðu Ninna, Albert, Annika og Gurðun – Tróndur var so góður við tykkum og tosaði ofta um tykkum. Tit hava mist so ómetaliga nógv, og má Jesus styrkja tykkum í stóru sorg tykkara.

Góði Tróndur, vit sakna teg. Takk fyri alt tú var fyri okkum – Vit síggjast.

Tú fer altíð at búgva í okkara hjørtum.

**Vinfólk tíni av Háskúlanum 2001**